# Bygdaráðsfundur

## Bygdaráðsfundur 23. 01. 2012

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Bygdaráðssalurin | |
| Hjástødd vóru: | Símun Johannesen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Johannus Danielsen | x |
| | Peddy Højgaard | x |
| | Petur J. Petersen | x |
| | Jákup M. Kjeld | x |
| | Alfred Olsen - ref. | x |

**Mál nr. 7/2012 Byggimál.**
J. nr. 2011-0042-0284.
Í umsókn dagf. 29.11.2011 søkir Haraldur S. Hansen, Toftir, um byggiloyvi til eina havastovu á matr. nr. 667, á sama økið, sum fyrr hevur verið søkt um loyvi til eitt drívhús.
Húsið verður 4 metur breitt, 5,85 metur langt og hæddin verður 3,5 metrar.
**Tekniska nevnd mælir til, at byggiloyvi verður givið til havastovuna treyta av, at eigarin av matr. nr., verður tann sum søkir um byggiloyvi.**
**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 9/2012 Ansingarmál**
J. nr. 2012-0031-0128
Í sambandi við at foreldur hava spurt um, og við hesum eisini søkt um, at fáa ansingina av barni teirra frá kl. 07.15 á morgni í dagrøktini.
**Trivnaðarnevndin heldur ikki, at takast skal atlit til einstøk børn, ella tørvin hja einstøkum foreldrum, men at dagrøktar- og barnagarðsansingartilboðið í Nes kommunu, í útgangsstøðnum, er galdandi frá kl. 07.00 á morgni. Nevndin heldur, at um dagrøktarleiðarin kann fáa hetta at passa við arbeiðstíðina hjá einstaka dagrøktarum, so kann hetta lata seg gera.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.**
**Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 10/2012 Ansingarmál.**
J. nr. 2011-0031-0124.
Í skrivi dagf. 05.12.2012 søkir Barnagarðurin um stuðul til barn við serligum tørvi.

Biðið verður um stuðul 20 tímar um vikuna og er hetta í samráð við NSR-tænastuna.
**Trivnaðarnevndin var samd um at mæla til, at játta 20 tímar um vikuna, sambært tilráðing frá leiðsluni í Barnagarðinum.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini.**
**Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 11/2012 Ansingarmál.**
J. nr. 2010-0031-0090.
Í skrivi dagf. 05.12.2011 søkir Barnagarðurin um stuðul til barn við serligum tørvi.
Biðið verður um stuðul 30 tímar um vikuna og er hetta í samráð við NSR-tænastuna.
**Trivnaðarnevndin var samd um, at mæla til, at kommunan framhaldandi játtar stuðulin sum er 30 tímar um vikuna, samb. teimum tilráðingum sum eru í málinum.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini.**
**Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 13/2012 Mentamál**
J. nr. 2012-0023-0108
KFUM skótarnir søkja um stuðul til familjulegu sum verður á Selatrað frá 05.-08. juli 2012.
**Mentanarnevndin mælir til at játta KFUM leguni á Selatrað 5-8. juli 2012, kr. 3.000,00 í stuðli.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilráðingini frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av konto "stuðul ymiskt".**
**Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 14/2012 Mentamál**
J. nr. 2012-0024-0010
Hin 03.01.2012 søkir Svimjisamband Føroya um stuðul til ráðstevnu sum ætlandi verður í Norðurlandahúsinum 20-22 apríl 2012.
Væntandi koma eini 80-100 útlendingar til stevnuna.
**Mentanarnevndin mælir til at játta 2.000,00 kr. til ráðstevnuna hjá Svimjisambandi Føroya í Norðurlandahúsinum 20.-22. apríl 2012.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilráðingini frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av konto "stuðul ymiskt".**
**Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 15/2012 Vegamál.**
J. nr. 2007-0023-0015
Skriv frá Stýrinum fyri Hagan á Mýrunum viðv. leigu av økinum til gøtuna rundan um innara part av Toftavatn, sum innihelt eitt uppskot um leigusáttmála fyri gøtuna, og um treytirnar, áramálini fyri leiguna og leigukostnaðin tey fyrstu 20 árini.
**Mentanarnevndin mælir til, at hetta uppskotið, um leigusáttmála fyri gøtuna, verður viðgjørt á bygdaráðsfundinum.**
**Fíggjarnevndin mælir til at kannað kostnaðin fyri møguligum keypi av undirlendinum til bygdaráðsfundin.**
**Bygdaráðið samtykti, at kommunurnar gera ein leigusáttmála við Ognarhagan á Mýrunum fyri eitt 20 ára skeið við møguleika at leingja avtaluna, har tað árliga leigugjaldið verður 10.000,00 kr. í 7 tey fyrstu árini og síðani eitt árligt gjalda á 1.000,00 kr.**

**Mál nr. 16/2012 Fíggjarmál.**
J. nr. 2011-0011-0028.
Kongshavnarhavn hevur lagt fíggjarætlanina fyri 2012 og hevur sent hesa til ummælis hjá kommununum.

Høvuðstøluni eru hesi:

| **Konti** | **ætlan 2012** | **ætlan 2011** |
|---|---|---|
| Havnagjøld | 674.000,- | 641.000,00 |
| Uppkrevjingarkostnaður | 168.500,- | 160.250,- |
| **Inntøkur netto** | **505.500,-** | **480.750,-** |
| Útreiðslur: | | |
| Fyrisiting | 143.000,- | 73.000,- |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 1.500,- | 1.500,- |
| Marknaðarføring | 75.000,- | 75.000,- |
| Umhvørvið | 10.000,- | 10.000,- |
| Rudding | 70.000,- | 70.000,- |
| **Útreiðslur** | **299.500,** | **229.500,-** |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **206.000,-** | **251.250,-** |
| Rentuinntøkur | 15.000,- | 15.000,- |
| **Ársúrslit** | **221.000,-** | **221.000,-** |

**Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna løgdu fíggjarætlanina hjá Kongshavnar Havn fyri 2012.**
**Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.**